sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller

Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild:
Jonhard Hammer
Dagbjort S. Hansen

Blaðfólk:
Aki Bertholdsen,
Turið Kjølbro
Dagfinn Olsen
John Johannessen
Sveinur Trondarson

Ítróttarskrivari:
Emil L. Jacobsen

Myndamenn:
Jens Kristian Vang
Alvur Haraldsen
Útgevari, uppseting og prent:
Sp/f Sosialurin
Bústaður:
Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76,
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail:
post@sosialurin.fo

# Edmund Joensen og marknamálið

## *Oddagrein*

AFTUR i dag roynir formaður sambandsfloksins at tvaa sínar hendur sum eina ávísur maður gjørdi á sinni. Í viðmerking í blaðnum í dag ger Edmund Joensen allar teir føroyingar, ið halda markna-avtaluna við Bretland vera eina góða avtalu, til „jubilidiotar". Hann brúkar samanberingina við, at vit at tapt 0-5 men kortini halda okkum hava vunnið. Longu niðri í somu grein jublar hann yvir, at bretar høvdu slakað meir enn 95%, áðrenn Anfinn gjørdist løgmaður. Hetta i sær sjálvum er ein stór sjálvmótsøgn, tí hevur tú - antin tú so eitur Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg ella okk-urt annað - fingið hin partin av slaka so nógv, at tú sjálvur samanlagt hevur fingið meira enn 95%, burtur úr, so má sanniliga sigast, at væl er sam-ráðst. Tvs. at formaður sambandsfloksins her viðgongur, at vit føroyingar - taka vit allan markna-spurningin í síni heild við - hava gjørt eitt sera gott arbeiði.

FORMAÐUR sambandsfloksins og fyri tað eisini sambandsblaðið Dimmalætting hava sjálvandi loyvi til at speireka og gera gjøldur burtur úr tí arbeiði, sum aðrir personar hava gjørt í hesum máli, eitt nú samráðingarleiðarin. Tað er ov biligt, tað er ósakligt, tað er tendensiøst og tað er ó-solidariskt við restini av Føroyum, nú tá málið loksins er loyst, og tað eru aðrir enn Edmund Joensen, sum hava fingið tað seinasta uppá pláss, at eftirrationalisera og siga, at úrslitið gjørdist ikki nóg gott. Tí hetta er eitt postulát - hetta er nakað, sum man bara kann slongja út uttan at hava eitt einasta eitt prógv fyri tí. Hetta er so mikið burturvið, at man loyvir sær at seta stórt spurnartekin við leiklutin hjá undanfarna løgmanni í hesum álvars-máli. Væl vitandi, at hann eisini hevur fingið okkurt av skafti, so er tað tó eisini ein sannroynd, at løgmaður spældi við eld og kundi einsvæl verið orsøkin til, at hetta málið varð mist á gólvið. Taktikkurin hjá løgmanni var nevniliga ein kon-frontatiónskós móti bretum, eisini tá hesir høvdu slept sínum fullkomiliga órímuliga kravi langt inn á landgrunnin. Løgmaður førdi „kalt kriggj" móti bretum og roknaði so við at fáa somu bretar at geva seg politiskt og geva honum eina avtalu, sum er betri enn verandi avtala. Eisini her kemur vantandi logikkurin hjá formanni sambandsfloksins til sjóndar. Soleiðis samráðist man ikki - soleiðis rokkur tú ikki semjum. Eftir okkara tykki hevði krav hansara um politiskan fund uttan iva ført til, at málið endaði í Haag. Og tá vistu vit ikki, um vit vóru keypt ella seld. Og samtíðis varð lok lagt á allan oljuútviklingin um okkara leiðir komandi fimm árini.

FORMAÐUR sambandsfloksins hevur rokkið sín-um máli. Hann hevur við ósakligum og reint per-sónligum niðurstøðum niðurgjørt arbeiðið hjá øllum øðrum, sum hava verið við í hesi sakini. Uttan uppá nakran máta at kunna prógva at siga, at vit høvdu fingið meira burtur úr, um hansara leið varð fylgt - í so álvarsligum máli - er formanni sam-bandsfloksins og flokkinum sum heild til lítlan sóma. Soleiðis arbeiða ikki ábyrgdarfullir politikkarar. Hetta kann best lýsast við myndini um at stinga sínar egnu í ryggin. Hvørki meira ella minni. Bara tað at siga, at framtíðar søgumenn eru hansara sannleikavitni, vísir, hvussu langt úti fyrrverandi løgmaður er í hesum máli. Við tí hevur hann máað støðið undan teimum varðum, ið hann sjálvur metir seg hava lagað í síni løgmanstíð. Kanska søgan fer at fortelja okkum okkurt, sum avdúkar veruliga leiklut hansara í hesum máli.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Kommentar til Elsa Funding



I forbindelse med interviewet med Elsa Funding i Sosialurin d. 12. mai 1999 er der to ting, jeg for en god ordens skyld skal kommentere:

**DBI**

Elsa Funding siger: »Eg undrist stórliga yvir, at tað skal bera einum til, ið umboðar fundementalistisku bíbliu-upptatanina hjá Dansk Bibel Institut at standa teologiskt embætisprógv við lærda háskúlan«.

Kommentar: At Dansk Bibel Institut bygger pa sit virke pa, at Bibelen er Guds Ord fra ende til anden, og at vi der har kunnet supplere den undervisning, vi fik ved universitetet, det var et gode for os i studeitiden. Og som krævet aflagde vi naturligvis teologisk embedseksamen ved universitetet. Men da det lader til, at Elsa Funding mener, at universitetet ikke er kompetent til at bedomme kandidaternes faglige viden og kunnen, sa burde hun formidle denne kritik til universitetet. Det ma være den rette adresse.

**1. JUNI**

Elsa Funding har videre en kommentar til mit svar i femmeren angaende den 1. juni. Og da det lader til, at det har Elsa Fundings interesse, skal jeg da gerne indvie hende i de overvejelser, jeg gor mig lige for tiden.

Det er afgorende for præst og menighed, at det er muligt at være og bygge menighed pa bibelsk grund. Derfor sa præsten i Fuglefjord præstegæld sig nodsaget til at skrive til menighederne og det gjorde han. Siden var der en række præster og sognebørn, der fandt anledning til at rejse denne sag for biskoppen og kirkeministeriet. Biskoppen meldte siden tragisk klart ud, nu venter vi så på svaret fra Kirkeministeriet. Kirkeministeriet har givet forskellige udmeldinger om, hvor lang tid de forventer, der gar, inden et svar kommer (lige fra hurtigt til længere tid). Sa meget ved vi dog, at biskoppen i brev af 29/4-1999 er blevet bedt om at kommentere 7 henvendelser/klager, der er kommet til Kirkeministeriet. Og disse kommentarer fra biskoppen er formodentlig sendt, da de fleste forhold allerede har været behandlet og kommenteret af biskoppen i dagspressen og i forskellige skrivelser. Nu venter vi så på Kirkeministeriets svar.

På den baggrund har de, der har rejst sagen for Kirkeministeriet, mundtligt og siden skriftligt bedt mig vente med at tage den endelige afgorelse til Kirkeministeriets svar foreligger. Der det da rigtigst at imødekomme dette ønske i respekt for den indsagt, de har gjort for vores kirke, og så eventuelt vente den formodentligt korte tid, det tager? Det vil jeg gerne overveje sammen med andre, hvis det skulle blive nødvendigt.

**Peter O. K. Olofson**
**Songepræst, Fuglefjord præstgæld**

# Fíggjarmálastýrið má virða gjørdar avtalur



AVRIT

**Semja millum**
**Fíggjarmálastýrið**
**og**
**Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara**
**um næmingatal í flokkum**

Sáttmálasamráðingarnar fyri hesa ferð eru um at vera avgreiddar. Eitt av fáu felogunum, sum enn ikki hevur skrivað undir, er Yrkisfelagið hjá Studentaskúla-og HF lærarum (YF), og nú kann tað enda við, at lærararnir fara í verkfall komandi fríggjadag - tann dagin tá munnligu próvtøkurnar hjá 2. hf eru settar at byrja.

Tað er væl skiljandi, at næmingar, foreldur og onnur órógvast og undrast, hví hetta skal vera so. Vit undrast eisini um, at tað ikki skal lata seg gera at finna eina semju, og vit halda, at arbeiðsgevarin er sera stívrendur við ikki at vilja virða tað, sum semja áður er gjørd um.

Ósemjan snýr seg í høvuðsheitinum um tveir lutir.

Annar er lønarkravið. Tann spurningin fara vit ikki at gera viðmerkingar til her, og vit rokna við og hava tað álit á pørtunum í trætuni og semingsmonnunum, at tað sum í øllum øðrum førum fer at bera til at finna eina semju um hetta.

Hin spurningurin er hámarkstalið á næmingum í flokkunum (24). Hetta er eitt prinsipielt mál, sum YF og landsstýrið í fjør gjørdu semju um. Fíggjarmálaráðharrin, sum er arbeiðsgevari hjá YF, var ikki komin í hetta sessin tá, og tí loyva okkum tí hervið at lýsa fyri honum søguliga høpið undir semjuni í fjør, og harvið hví vit halda, at hetta hámarkstalið als ikki er ein samráðingarspurningur, hvørki hesa ferð ella í framtíðini.

Í 1991 gjørdi landsskúlafyrisitingin, LSF, av, at 28 næmingar skuldu vera í tveimum 1. flokkum í Studentaskúlanum í Eysturoy. Lærararnir mótmæltu og vístu á siðvenjuna, at tað ongantíð høvdu verið fleiri enn 24 næmingar í einum flokki. LSF kveistraði hetta av borðinum og segði, at siðvenjur kundu broytast, og lærararnir slerdu seg til tols við hesum.

Í 1992 var landskassin tómur. Landsstýrið ynskti at spara – eisini á okkara øki – og YF og LSF samráddust um, hvussu hetta kundi lata seg gera. Úrslitið var, at lærararnir hildu frí í eina viku uttan løn á heysti í 1992. Í hesum sambandi eydnaðist YF formliga at fáa sligið fast, at óskilið við stóru flokkunum frá 1991, ikki skuldi endurtaka seg.

Semjan um frívikuna og sparingina, gekk út uppá, at fyri vikuna, sum YF limirnir mistu, gekk LSF við til:

1. „at næmingatalið í einum studentaskúla- og HF flokki eigur vanliga ikki at fara upp um 24. Í undantaksføri kann tó verða farið upp um 24 næmingar. Avgerð um hetta skal verða tikin í samráði við YF......"
2. „at seta meiri pening av enn higartil til dagføringar av útbúgving læraranna... "
3. „at ein langtíðarætlan verður gjørd um flokkatal á skúlum við støði í tí plássi, ið skúlarnir hava, og við støði í hesum verður funnið fram til eina samsvarandi játtan".

Landsstýrið fekk sína sparing beinanvegin, meðan ágóðin, sum YF hevur fingið av semjuni, hevur verið meiri ivasamur. Punkt trý gjørdi LSF ongantíð nakað við, punkt tvey mundi tað vera so sum so við, og í januar 1998 mátti YF vera í verkfalli millum triggjar og fýra vikur, tí myndugleikarnir ætlaðu at taka aftur tað einasta, sum teir góvu í 1992.

Verkfallið í januar 1998 endaði við einari semju millum Fíggjarmálastýrið og YF, har tað enn eina ferð varð staðfest, at vanliga eigur næmingatalið í einum studentaskúla- og HF flokki ikki at fara upp um 24, og **at sáttmálin skuldi verða dagførdur sambært hesum.**

Nú vil YF hava hetta í sáttmálan. Tað vil landsstýrið ikki. Samráðingarleiðarin hjá teimum sigur, at tá ein sáttmáli er uppsagdur, so er einki galdandi, og tað skal so at siga byrjast frá botninum av.

Tað er rætt, at vit hava onga høvuðsavtalu, og tað er rætt, at í prinsippinum er eingin sáttmáli galdandi, men siðvenjan er, og tað hava vit sæð hesar síðstu vikurnar, nú nýggir sáttmálar eru undirskrivaðir, at í samráðingum verður støðið tikið í tí, sum hevur verið galdandi, og tá YF hevur fingið so nógv bæði í 1992 og í 1998 fyri at fáa 24 talið upp á pláss, so eiga øll at skilja – og tað álit hava vit á landsstýrismanninum, at hann eisini ger – at hetta kann ikki vera ein samráðingarspurningur hesa ferð.

Tí eru okkara ráð, at sáttmálin verður dagførdur sambært avtaluni frá 28. januar 1998, soleiðis at næmingarnir kunnu fara til próvtøku eftir kunngjørdu ætlanini, og soleiðis at næmingar, lærarar og onnur avvarandi fáa trygd fyri, at hetta sirkusið ikki fer at endurtaka seg ár eftir ár.

**Kambsdalur, hin 14. mai 1999**
**Jóannes Hansen**
**Kári Nolsøe Olsen, limir í YF**

